# Heimarøktin Sandoyar øki

Í samband við døgnrøkt skal setast í verk eru 2 avloysarastørv sum økissjúkrarøktarfrøðingar á niðursetta tíð leys at søkja. Eisini umsøkjarir sum ynskja at arbeiða fulla tíð eru vælkomnir at søkja. Størvini eru til 31.07.03 og 31.08.03 og skulu setast skjótast tilber.

Heimarøktin Sandoyar øki er ein skipan, har heimarøkt, røktarheims - og sambýlis røkt og rakstur verður samskipað, og har økissjúkrarøktarfrøðingar starvast á øllum eindum.

**Vit søkja eftir sjúkrarøktarfrøðingum:**
- við hollum røktarfakligum royndum
- sum hevur hug og hegni at samstarva við ymiskar fakbólkar
- sum hevur hug og hegni at undirvísa og vegleiða starvsfelagaðar, lesandi og næmingar.
- sum hevur hug at starvast bæði inni á bústovnum og úti í heimarøktini.

**Vit kunnu bjóðað:**
- eitt spennandi og mennandi starv har arbeitt verður tvørfakligt.
- eitt starv við skiftandi avbjóðingum
- eitt starv í einum øki, sum er í støðugari menning.

Størvini eru lønt eftir sáttmála millum Felagi Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Ásu Davidsen, økisleiðara, tlf. 361749

Umsókn við avriti av prógvum og autorisatión verður at senda til

**Heimarøktina & Serforsorgina,**
Eirargarður 2,
Postbox 3037, FO - 110 Tórshavn.

Umsóknarfreist: 4.02.03

# Sethús í Klaksvík

Hervið verða húsini við Gráastein 6, í Klaksvík, lýst til sølu. Matrikkulnummari er 1533.

Grundstykkið er 618 m².

Húsini eru 145 m², útvendigt mát, í tveimum hæddum. (Íalt 290 m²).

**Húsini eru soleiðis innrættaði:**
**Ovara hædd:**
Køkur, stova, vindfang, gangur, 3 sovirúm, hjúnarrúm, kontór, baðirúm og eitt lítið wc.

**Niðara hædd:**
Køkur, stova, hjúnarrúm, sovirúm, baðirúm, vaskirúm, fýrrúm/turkirúm, gangur, kjallari og garaga.

Ovara og niðara hæddin kunnu verða sjálvstøðugar íbúðir.

Húsini eru bygd í 1970 og eru væl hildin. Urtagarður er rundan um húsini.

Húsini verða seld um nóg høgt boð fæst.

Vinarliga ring á telefon **262389 eftir kl. 17.00** um okkurt at at spyrja um, ella tygum ynskja at síggja húsini.

# Stór sethús til sølu



Húsini í Onnugøtu 3, Tórshavn, eru til sølu. Gólvvíddin er 179 m2 (íalt í einari hædd), umframt eitt lægri loft, sum er 59m2.

Í húsunum er stórur køkur við komfýri, bakarovni og kuldaskápi, grovkøkur við komfýri, uppvaskimaskinu og vaski. Loftið í køkinum og stovuni ganga upp í tróðri. Tvey kømur eru umframt hjúnarrúm, stórt baðiverilsi við saunarúmi og eitt wc við brúsu og vaski. Fýrrúm við arbeiðsborði og hjallur við frystiboks.

Hiti er í køksgólvinum, gólvinum í grovkøkinum og í baðiverislinum.

Grundøkið er slætt við góðum parkeringsviðurskiftum, og húsini eru lætt atkomilig.

Húsini kunnu síggjast eftir nærri avtalu. Ringið

**Tlf. 225429 ella 448001**

# Sethús í Havn til sølu

**Javnagøtu 10**



Húsini eru í 2 hæddum, hvør 120 fermetrar og standa í barnavinarligum, friðarligum umhvørvi við góðum útsýni.
Báðar hæddir eru innrættaðar, við íbúð í niðaru hædd. Grundøkið er uml. 500 fermetrar.
Uttanum húsini er stoyptur garður við trægirðing.
Byggiár: 1983.
Kostnaður: kr. 1.875.000

Áhugaði kunnu ringja
**tlf. 322424 ella 254637**

# Sómi 800

Sera vælhildin skjóttgangandi bátur til sølu.

Øll nautisk útgerð og installatiónir til el-snellir eru umboð.

Til sølu um hóskandi boð fæst.

**Tlf. 21 84 84**

# Búmerkjakapping

Nevndin í Fráhaldsráð Føroya (FRF) hevur samtykt at skipa fyri kapping um búmerki til felagið.

FRF er samstarvsfelagsskapur fyri skipaðu og sjálvbodnu fráhaldsfeløgini í Føroyum, og hevur til endamáls at virka sum bindilið, at savna og umboða fráhaldsfeløgini í landinum við virðing fyri lógum og viðtøkum hjá hvørjum øðrum. Virka fyri, at skapa almennan áhuga fyri fráhaldsmálum millum børn, ung og vaksin, og soleiðis eggja fólki til at taka lut í tí fráhaldspolitiska arbeiðinum.

Búmerkið skal á einfaldan og beinraknan hátt lýsa virksemi felagsins. Tað kann hava litir, men skal eisini kunna nýtast í svart/hvítum prenti.
Uppskot skulu vísa búmerkið í ymiskum støddum og uppsetingum og við dømum um samanseting av búmerki og navni felagsins. Uppskot skulu harafturat lúka faklig krøv til prenting og myndaframleiðslu.

Nevndin tekur støðu til innkomnu uppskotini.

Ein virðisløn, kr. 10.000 verður latin fyri tað uppskot, ið nevndin metir vera best. Metir nevndin ikki at nakað hóskandi uppskot er komið, skilar hon sær rætt til ikki at lata virðisløn.
Uppskot skulu bera frámerki, sum eisini verður sett á afturlatnan brævbjálva við navni á innsendara.
Uppskot skulu verða felagunum í hendi í seinasta lagi 28. feb 2003.

Uppskot skulu sendast til:

**Fráhaldsráð Føroya**
Box 271
FO-110 Tórshavn

# Útróðrarbátur til sølu



Faaborg 32 fót glastrevjabátur til sølu, selist v/u fiskiloyvi. Byggiár 1983, motorur Volvo Penta Tamd 61 frá 1987.

**Tlf. 318887/316643**

Sosialurin
-tað loysir seg



LØGMANSSKRIVSTOVAN

# Starvslesandi í Brússel

**(Stagiaire)**

Søkt verður eftir lesandi til sendistovu Føroya í Evropasamveldinum (Brússel). Starvstíðin er frá mars 2003 til juli 2003 ella fyri lestrarhálvárið.

**Uppgávur**
Tann starvslesandi verður partur av dagligu arbeiðsgongdini á sendistovuni, serliga við atliti at samskifti viðvíkjandi handli og fiskivinnu.

**Førleikakrøv**
Tann starvslesandi eigur at vera lesandi føroyingur við hægri háskúla, sum í minsta lagi hevur útbúgving á *bachelor* stigi.

Umsøkjarar eiga at hava góð samstarvsevni, vera áhitnir, miðvísir, kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar. Umsøkjarar eiga harumframt at vera stinnir í føroyskum og enskum máli.

**Starvsstaðið**
Starvsstaðið verður Sendistova Føroya í Evropasamveldinum, Rue d'Arlon 69, B-1040 Brussels. Sendistovan er skipanarliga samrunnin partar av Løgmansskrivstovuni.

**Setanartreytir**
Starvið er skipað eftir teim reglum, ið eru galdandi fyri starvslesandi á staðnum og er ólønt; men viðbót verður latin eftir nøktandi uppihald. Møguleiki er at søkja um ferðastuðul frá Studulsstovninum. Stuðul verður veittur til bústaðar-útreiðslur.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Herluf Sigvaldsson, deildarstjóra í uttanríkisdeildini á Løgmansskrivstovuni, tlf. 351010, ella til Hákun J. Djurhuus, sendimann í Brússel, tlf + 32 (2) 233 08 55.

**Umsóknir**
Umsóknir, prógv, c.v. og viðmæli verða at senda

**Løgmansskrivstovuni**
**Tinganesi**
**FO-100 Tórshavn**

*Telefax +298 35 10 15 * t-postur: info@tinganes.fo*

og skulu vera á Løgmansskrivstovuni í seinasta lagi mikudagin 29. januar 2003.

***Løgmansskrivstovan** er fyrisiting hjá løgmanni. Hon fevnir millum annað um uttanríkistænastuna við uttanríkisdeild og sendistovum í ávikavist Bretlandi, Danmark og Evropasamveldinum og situr fyri málum, ið eru løgd til løgmann sambært stýrisskipan Føroya umframt uttanríkismálum.*

<ph_1>



NOSA KAPPING 2003

B36

B36 bjóðar øllum dreingjum og gentum at gera lið til innandurakapping í fótbólti í høllini á Hálsi dagarnar **24. og 25.januar 2003**.

**Aldursbólkarnir eru hesir:**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Pinkur | f. 1993-1994 |
| 2. | Gentur 10-12 | f. 1991-1992 |
| 3. | Smágentur 12-14 | f. 1989-1990 |
| 4. | Gentur 14-17 | f. 1986-1988 |
| 5. | Pinkulingar | f. 1995-1996 |
| 6. | Smápiltar | f. 1993-1994 |
| 7. | Piltar | f. 1991-1992 |
| 8. | Smádreingir | f. 1989-1990 |
| 9. | Dreingir | f. 1987-1988 |
| 10. | Unglingar | f. 1984-1986 |

Spælt verður við stórum málum og málmanni.
Á hvørjum liði eru 5 leikarar (málmaður íroknaður).
Loyvt er at hava ein skiftisleikara.
Liðini skulu hava fótbóltsnøvn (Juventus, Rosenborg, B36 o.s.fr.).
Luttøkugjaldið er kr. 200,- fyri liðið.

Føroya Banki, ið stuðlar kappingini, letur heiðursmerki til trý tey fremstu liðini í hvørjum aldursbólki.

Seinasta freist at boða frá luttøku er
**týsdagin 21. januar 2003** hjá umboðsmonnunum við hesar skúlar, ella við at ringja:

| | | |
|---|---|---|
| Kommunuskúlin | Jacob Thomsen | 316229/211229 |
| Venjingarskúlin | Fróði Ludvig (9b) | 317149 |
| Eysturskúlin | Gunnar Bláberg (9d) | 317734 |
| Hoyvíkar skúli | Rúnar í Lon Jacobsen (7d) | 318015 |
| Santa Frans skúli | Hans Óli Højgaard (7. fl.) | 312756 |
| Argja skúli | Høgni Bech (10.) | 314180 |

**Minst til: Seinasta freist at boða frá luttøku er 21. januar**

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# LESIÐ LÍVFRØÐI Á SETRINUM

## við støði í føroyskum umhvørvi

Mánadagin 3. februar 2003 byrjar ein nýggj lestrarhálva á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum. Lívfrøðifakini, sum undirvíst verða í, eru:

- Aling
- Hagfrøði 2
- Vistfrøði í vatni
- Evolution
- Human fysiologi
- Plantu fysiologi
- Summarskeið – Vistfrøði í vatni
- Summarskeið – Vistfrøði á landi

Fólk uttanífrá kunnu melda seg til eitt ella fleiri av skeiðunum, ið verða.

Meira fæst at vita við at hyggja á heimasíðuna: www.sleipnir.fo/setur/nvd/nvd75.htm.
Her eru tímatalvur, lýsingar av skeiðunum og hvørjar fortreytir krevjast til tey ymisku fakini. Áhugað kunnu venda sær til Náttúruvísindadeildina tel. 352550 ella beinleiðis til Eyðfinn Magnussen tel 352559.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Reingerðarfólk

Tórshavnar kommuna søkir eftir reingerðarfólki til Tórshavnar kommunuskúla. Arbeiðstíðin er 3 tímar um dagin, tá skúlin er opin. Starvið verður sett 3. februar 2003. Løn sambært sáttmála við HavnarArbeiðskvinnufelag.

Áhugaði verða biðin um at senda skrivliga umsókn til Tórshavnar kommunu, postrúm 32, FO-110 Tórshavn ella seta seg í samband við húsavørðin, tlf. 31 23 83 ella 21 23 83 , skjótast til ber. Viðmerk á umsóknina "Reingerðarfólk"

SNARSKIVAN

# Til leigu

Handilshølini
**»Garðsbúðin«**
Argjavegur 53 á Argjum til leigu. Hølini eru í sera góðum standi og vælegnað til handil ella skrivstovu v.m.

Áhugað kunnu ringja 210051